# Kjak



**Frank Davidsen**
*Sørvágur*

## Showtime í Fólkaflokkinum

Burtursæð frá skilagóðu avgerðini hjá Anfinni Kallsberg, um at lata næsta mann á listanum koma á ting – helst orsakað av væntandi nývali – so var restin av tíðindafundinum hjá Fólkaflokkinum mikudagin 19. januar ein stórur glantrileikur.

Nú skuldi Fólkaflokkurin knappliga vera meira ábyrgdafullur samanborið við hinar flokkarnar í samgonguni og sýna sanna ábyrgdarkenslu við teimun, ið vórðu rakt av skerjingum samgongunar, við at flokkurin "hokus pokus" bara nýtist at hava tvey fólk í landsstýrinum.

Tí sum formaðurin segði eftirfylgjandi: "Vit í Fólkaflokkinum hava bert tvey sett av klæðum, tað eru arbeiðsklæðir og seingjaklæðir".

Sera skemtiligt. Maka til orðavavstur og sjóforkláringar, sum fólkafloksformaðurin kom við fyri at rættvísgera eitt politiskt bluffnummar, tað skal ein leita leingi eftir. Harra gud, hesin sami maður, sum fyri nøkrum krákumánaðum síðan undir miklum miðlarokið setti ein aðalstjóra í starv, vísir seg nú við enn einum bluffnummari.

Og ein kann í dag spyrja, hví hann partú skuldi seta ein aðalstjóra, um hann nú hevur ætlanir um, at niðurleggja sítt egna starv og leggja Uttanríkisráðið undir Fiskimálaráðið. Tí, um so er, er ikki tørvur á nøkrum aðalstjóra í Uttanríkisráðnum. Og er tað ikki tað, Jørgen Niclasen og Fólkaflokkurin ætla, so er bluffnummarið bara tað størri. Tí alt hansara tos um rasjonaliseringar gevur onga meining, um tað bara er EITT fólk, landsstýrismaðurin, sum skal úr Uttanríkisráðnum. Og vit hava longu hoyrt í miðlunum, at hann framhaldandi fer at fáa løn sum landsstýrismaður.

Men sjálvandi, hvat sakar tað, um hann sum táverandi varaløgmaður stovnaði eitt aðalstjórastarv, sum í minsta lagi kostar skattgjaldarunum 50.000 krónir um mánaðin? Og hvat sakar tað, um sami skattgjaldari skal gjalda fyri tað, um aðalstjórin verður uppsagdur, men sum tænastumaður fær løn í 3 ár – kanska útvið tvær milliónir krónur? Og hvat sakar tað, um sami skattgjaldari kemur at gjalda fólkaflokksformanninum bæði løgtings- og landsstyrisløn, minst 80.000 krónir um mánaðin, meginpartin av hesum árinum? Og havt sakar tað, at Javnaðarflokkurin telefoniskt fekk boð um tíðindafundin bert nakrar minuttir, áðrenn hann byrjaði? Og hvat sakar tað, at Jørgen Niclasen dregur okkara løgmann uppá tráð, soleiðis at løgmaður, sjálvt um hann hevur styrisskipanarlógina at ganga eftir, av fólkafloksformanninum verður brúktur sum jarnbrot í einum heilt óhugnaligum politiskum spæli um at vinna sær atkvøður, samstundis sum Jørgen Niclasen kalt og kyniskt leggur upp til nýval?.

Við hesi avgerð løgmans er alt álit veljarans á poltiska systemið fokið, tí nú kunnu flokkarnir í samgongu bara hvør sær heita á løgmann, um at til dømis tvey landsstyrisfólk í einum flokki leggja størvini niður, soleiðis at eitt triðja landsstyrisfólki kann taka sær av teirra málsøkjum. Eg veit ikki, um ein kann kalla tað anarki, men tað er tætt við.

Kanska er tað næsta, vit frætta, at løgtings- og landsstýrisfólk Fólkafloksins lata helvtina av lønini aftur í landskassan, tí so fara tey heilt vist at fáa nakrar atkvøður til høldar. Men um tey vænta tað sama við hesum bluffnummarinum, so munnu tey halda, at føroyski veljarin er skítbýttur.

---



**Sjúrður Skaale**

## Atlas, alfabet og málráð

*Heini Gaard sigur, at uppskotið um alfabetið varð felt. Bjarni Djurholm sigur, at tað varð samtykt. Hvørgin hevur rætt. Men Bjarni fer minni skeivur enn Heini. Málið gongur sum tað skal*

Nú skal aftur eitt atlas gerast. Aftur verður spurt, hvussu lond skulu stavast - og aftur eru miðlarnir farnir at skriva um "alfabetmálið". Men tað, sum verður sagt, er ikki heilt rætt.

Næstsíðsta fríggjadag skrivaði Heini Gaard t.d. í Dimmu, at mítt uppskot um at autorisera latínska alfabetið í fullum líki "fall á løgtingi". Tað er ikki beint.

Og síðsta fríggjadag skrivaði Bjarni Djurholm í Sosialinum, at løgtingið "samtykti... at c,q,w,x og z aftur fáa síni sjálvsøgdu pláss í alfabetinum". Tað er heldur ikki beint.

Veruleikin er einastaðni mitt ímillum. Hann er hesin:

Undir báðum orðaskiftunum á løgtingi um uppskotið gjørdist greitt, at tað á løgtingi var stórur meiriluti fyri teirri hugsan, at vit skulu nýta latínska alfabetið í fullum líki.

Undir viðgerðini í mentanarnevndini gjørdist greitt, at har var full semja um hetta sama.

Ein meiningarkanning varð eisini gjørd meðan málið var til viðgerðar, og hon vísti, at ein stórur meiriluti av føroyingum heldur, at føroyingar skulu hava sama alfabet sum onnur.

Alt bendi sostatt á, at uppskotið fór at verða samtykt.

### Atfinning tikin til eftirtektar

Nakrir málfrøðingar og nakrir kjakarar hildu kortini, at vit skulu varðveita tað skerda alfabetið. Eg helt ikki, at argumentini hjá hesum fólkum sum heild vóru sannførandi. Men tey høvdu eina atfinning, sum eg tók til mín: Nevniliga at løgtingið ikki skal lóggeva um málsligar spurningar. Tey vístu á, at tingfólk ikki eru serfrøðingar í máli, og spurdu hvat næsta málsliga stríðsmál verður, sum endar á tingborði.

Hesin viðkomandi kritikkur varð tikin til eftirtektar.

Tí varð uppskotið um at áseta alfabetið við lóg aldrin lagt til atkvøðugreiðslu. Eg broytti tað sjálvur til eitt uppskot um at "skipa eitt málráð, har ymiskar málpolitiskar fatanir verða umboðaðar, og sum skal hava myndugleika at gera av spurningar av málsligum slagi."

Uppskotið varð 8. oktober 2009 samtykt við 21 atkvøðum fyri, trimum blonkum og ongari ímóti.

Tá atkvøtt verður um eitt uppskot, tekur løgtingið bert støðu til uppskotið sjálvt - og ikki til viðmerkingarnar til uppskotið. Men ein fullsamd mentanarnevnd hevði kortini í viðmerkingunum eitt greitt tilmæli til tað komandi málráði um, at tað fulla alfabetið skal autoriserast í Føroyum.

Seinni tók Málnevndin á Føroyamálsdeildini spurningin til viðgerðar, og eisini har var full semja um, at allir latínsku stavirnir skulu hýsast í okkara alfabeti.

Uppskotið varð altso hvørki felt ella samtykt - men Løgtingið gav sína greiðu støðu til kennar.

### Fullur amboðskassi

Síðani hevur Helena Dam á Neystabø, í samsvari við løgtingsins vilja, snikkað til eitt uppskot um eitt breitt samansett Málráð.

Málráðið verður suverent. Men tað mest sannlíka man kortini vera, at støða ráðsins til alfabetið verður í samsvari við tað, sum meirilutin av føroyingum heldur. Sum meirilutin av løgtinginum heldur. Sum ein samd málnevnd heldur. Og sum ein samd mentanarnevnd hevur mælt til.

Hendir tað, verður ikki neyðugt at skáksigla uttanum ávísar bókstavir, tá nýggja atlassið verður gjørt.

Alfabetið er málsins grundleggjandi amboðskassi. Fyri nøkrum árum síðani vórðu fimm amboð tikin úr kassanum. Tað hevur órógvað føroyska málrøkt, og gjørt málið meira stirvið enn neyðugt.

Nú er at vóna, at tey fimm amboðini verða løgd upp á pláss aftur. Tí tá verður munandi léttari at smíða eitt atlas, sum øll taka til sín.